# Friskir vindar í landslagnum

Fimm bólkar, sum á útgávum ella konsertum hava gjørt vart við seg í 2006, eru í uppskoti at vinna Planetina fyri ársins nýggja bólk ella einstakling



Thor Simonsen skrivar og spælir elektroniskan tónleik, sum í føroyskum samanhangi er rættiliga nýskapandi.

**BESTI NÝGGI**

**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Fimm bólkar, sum hava fingið størri ella smærri gjøgnumbrot í føroyska tónleikaheiminum í 2006, kappast um at vinna Planetina, sum verður latin til besta nýggja bólk ella einstakling.

Onkir av teimum, sum eru tilnevnd, hava givið tónleik út í farna ári, meðan onnur hava gjørt meira vart við seg á konsertum kring landið.

Ein av teimum er spennandi bólkurin Boys in a Band, sum kom burtur úr ongum og spældi seg fram á næstfremsta plássið í føroysku útgávuni av tónleikakappingini Global Battle of the Bands. Bólkurin, sum boðar nýggjar tónar í føroyskum rocktónleiki, er úr Eysturoynni, men ljóðið er hvørki serliga mainstream ella serliga alternativt – tað er næstan retro. Bólkurin er framúr góður á palli, og tað er fyrst og fremst har, at hann hevur gjørt vart við seg higartil.

The Story Ends er ein annar føroyskur rockbólkur, sum hevur verið frammi í 2006. Bólkurin hevur verið trý ár á baki, men tað var í fjør, at fólk rættiliga fingu at hoyra bólkin í breiðari samanhangi – á útgávu og til konsertir.

Isadora and The Rebels er eitt annað navn í føroyskum tónleiki, sum alsamt fleiri fólk nikka jaliga til. Við Guðrið Hansen, sum bergtakandi sangara og frontkvinnu, er bólkurin nakað fyri seg í føroyskum tónleiki. Bólkurin hevur havt sannførandi framførslur í 2006, og spennandi verður, um framtíðin fer at bjóða veruliga útgávu við bólkinum.

Búi Dam er høvuðsmaðurin aftanfyri bólkin Budam, sum á konsertum hevur spælt serligan søgutónleik, sum Búi hevur skrivað uppi í andalusisku fjøllunum.

Thor Simonsen fæst við nakað, sum fáir føroyskir tónleikarar veruliga hava brúkt tíð til – nevniliga hip hop tónleik. Thor kom við fløgu í 2006, og tónleikurin var tikin upp á sovikamarinum hjá honum. Talan er um elektroniskan tónleik, sum í føroyskum samanhangi er rættiliga nýskapandi.

**BESTI NÝGGI BÓLKUR ELLA EINSTAKLINGUR**

| | |
|---|---|
| Boys in a Band | pla nb 1 |
| Budam | pla nb 2 |
| Isadora and The Rebels | pla nb 3 |
| The Story Ends | pla nb 4 |
| Thor Simonsen | pla nb 5 |

Send til tlf. nr. 1930

# Festivalbólkar standa seg væl

Tríggir bólkar, sum hava gjørt vart við seg á føroyskum festivalum, eru í uppskoti sum besti útlendski bólkur



Danski rockbólkurin Nephew er heitari enn nakrantíð og er í uppskoti til eina Planet virðisløn

**BESTI ÚTLENDSKI**

**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Eitt heimskent navn, eitt minni kent navn og tríggir bólkar, sum hava spælt í Føroyum, eru í uppskoti sum besti útlendski bólkur í 2006.

Beth Hart og Nephew hava bæði spælt á G-festivalinum í Gøtu, og teirra framførslur hava verið heilt góðar. Nephew tók øll við stormi fyri tveimum árum síðani, og hóast Beth Hart var rímiliga ókend sum navn, tá ið hon varð avdúkað sum festivalnavn hjá G!, so vaks hon seg stóra og sterka, og hon hevði eina frálíka framførslu í fjørsummar.

Nú eru bæði Nephew og Beth Hart í uppskoti sum besti útlendski bólkur til Planet Awards, og tað eru tey saman við einum triðja festivalbólki. Tað er Johnny DeLuxe úr Danmark, sum hóast nógv seinkaðir til Føroya høvdu eina sera góða framførslu á Summar Festivalinum í august.

Saman við hesum trimum nøvnunum, sum føroyingar hava kunnað upplivað á palli farnu tvey árini, eru ein bólkur úr USA og ein bólkur úr Australia eisini tilnevndir.

Tann kendi av teimum er Red Hot Chili Peppers, sum hava verið frammi í nógv ár, og sum í fjør komu rættiliga afturíaftur við útgávuni Stadium Arcadium. Serliga lagið Dani California hevur klárað seg væl – eisini í Føroyum.

Hin bólkurin er tann minst kendi í rúgvuni. Wolfmother er úr Australia, og teir fingu í fjør gjøgnumbrot við sínari fyrstu útgávu. Tónleikurin er rockur, sum hevur fingið sín íblástur úr sjeytiárunum og bólkum sum Black Sabbath og Led Zeppelin.

**BESTI ÚTLENDSKI BÓLKUR**

| | |
|---|---|
| Beth Hart | pla ub 1 |
| Johnny DeLuxe | pla ub 2 |
| Nephew | pla ub 3 |
| Red Hot Chili Peppers | pla ub 4 |
| Wolfmother | pla ub 5 |

Send til tlf. nr. 1930